Føroya Blindastovnur

# Stuðulsgrunnur Føroya Blindafelags

Umsóknir um peningaligan stuðul úr Stuðulsgrunninum skulu vera grunninum í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2006.

Umsóknarbløð fáast hjá Føroya Blindafelag

Adr. Føroya Blindastovnur
Íslandsvegur 10 A, Tórshavn
Boks 2074,
FO-165 Argir
tlf: 31 82 22

**Endamál grunnsins er:**
At veita hjálp til blind og sjónveik, ið til fánýtis hava søkt um hjálp.

At veita stuðul til luttøku á skeiðum, fundum og øðrum tiltøkum fyri sjónbrekað í Føroyum og uttanlands – tó treytað av, at umsøkjarin er limur í Føroya Blindafelag.

**Nevndin**

---

**Mentamálaráðið**
FÓLKASKÚLADEILDIN

## Skúlastjórastarv í Sandoyar Meginskúla

Starvið sum skúlastjóri í Sandoyar Meginskúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2006.
Í Sandoyar Meginskúla eru 111 næmingar í 5. – 10. fl. 14 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir skúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans.
- skal sýna leiðslumyndugleika og hegni at leiða
- dugir at samstarva og er fyrikomandi.
- hevur hugsjónir um skúlamenning, og hvussu menningarætlanin verður sett í verk.
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk skúlans.
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal skúlastjórin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd.
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim.
- vera førur fyri at loysa trupulleikar.
- vera førur fyri at útinna eina mennandi starvsfólkaleiðslu og tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning.
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan.
- leggja dent á at menna skúlaskapin í kommununi.
- eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdina bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Sandoyar Meginskúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið verður lønt í lønarflokki 34.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, og er lønin 1. august 2006 kr. 32.129,66. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvi, C.V. o.ø. skal verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 4. apríl 2006 kl. 16.00.**

Umsóknin verður stílað til:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 355050.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

samsir.fo

---

# SKEIÐ Í SPREINGITØKNI



**mikudagin 29. mars kl. 8.30**
**á Hotel Føroyum**

Tilmelding hjá Klement Petersen
tel 44 75 60 ella teldupost:
jan@klementpetersen.fo
innan 21. mars

Heiðavegur · 600 Saltangará · Tel 44 75 60
Fax 44 84 60 · www.klementpetersen.fo
pf Klement Petersen

---

# Búskaparfrøðingur til Hagstovuna

Hagstovan hevur eitt starv tøkt til ein búskaparfrøðing at arbeiða við tjóðarroknskapi.

Uppgávan er at vera við til at menna uppgerðina av tjóðarroknskapinum og har serliga privata vinnuliga partinum av honum.

Fremst av øllum sóknast vit eftir einum akademiskt útbúnum búskaparfrøðingi, men tað ber saktans til at søkja, um tú heldur teg hava aðrar førleikar til starvið.

Lønt verður eftir sáttmála millum Landsstýrið og avvarðandi fakfelag. Umsóknarfreistin er 1. apríl 2006, tá skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi. Vilt tú vita meira um starv, treytir og arbeiðspláss, ring so til Herman Oskarsson ella John Jacobsen á tlf. 35 28 00.

HAGSTOVA FØROYA

---

# Dagstovnurin í Hósvík søkir eftir

køksfólki, ið kann átaka sær at gera mat á stovninum og kann byrja sum skjótast. Eingin beinleiðis útbúgving er kravd, men tú skal hava áhuga fyri matgerð og sunnum kostvanum, harafturat er ein treyt, at tær dámar børn. Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna.

Eisini verður søkt eftir vikarum, ið kunnu byrja beinanvegin. Áhugað kunnu venda sær til leiðaran Gitte Jørgensen tlf. 772020.

Umsóknin skal sendast til:

**Dagstovnin í Hósvík**
Áarvegur 3
420 Hósvík

Freistin at søkja størvini er úti 28. mars.